## DAGSINS MEINING

### 46664

Undir hesum heitinum ella nummarinum varð í vikuni á altjóða AIDS-degnum hildin stór konsert í Suðurafrika við fleiri av heimsins kendastu tónleikarum. Konsertin var hildin til frama fyri fólk, sum eru rakt av HIV og AIDS. Her verður serstakliga hugsað um tær milliónir í Afrika, sum eru rakt av hesi herviligu sjúku.

Tølini 46664 var fongsulsnummarið hjá Nelson Mandela tey 18 árini hann sat fangi á Robin Island í Suðurafrika undir hvíta apartheidstýrinum. Hann sat tó fangi í tilsamans 27 ár í ymsum fongslum.

Stigtakararnir til AIDS-konsertina við Nelson Mandela á odda høvdu valt at brúka fongsulsnummarið hjá Mandela – 46664 – sum var tað hann var reduseraður til sum menniskja, meðan hann sat í fongsuli - sum skjaldramerki /herróp fyri innsavningina av pengum.

Á konsertini vóru fleiri av heimsins kendastu rock-orkestrum, teirra millum Queen, hvørs sangari Freddie Mercury doyði av AIDS fyri mongum árum síðani.

Nelson Mandela, sum ikki er nakar unglingi longur, hann er 85 ára gamal, hevur brúkt nógv av síni tíð seinastu árini í stríðnum móti AIDS. Hann eggjar fólkum, felagsskapum og stjórnum kring allan heim um at vísa hesum stríði størri ans. Hann sigur, at AIDS er ein ómetalig vanlukka fyri alt Afrika. –Í fongsuli var eg eitt nummar, fólk við AIDS eru einans eitt nummar. AIDS er ikki ein sjúka, tað er ein spurningur um mannarættindi segði hann í London herfyri.

Her heima hjá okkum verður við jøvnum millumbili tosað um, hvussu nógv vit skulu lata í menningarhjálp og til hvønn. Tað hevði uttan iva verið eitt gott hugskot, um okkara myndugleikar vístu slíkum tiltaki sum hesum ella øðrum tiltaki ans og vóru við til at lata pengar til tess góða endamál: at upplýsa um AIDS, at hjálpa AIDS-raktum ol. At vit góvu eina hjálpandi hond til menningarlond í Afrika hevði bara kunnað skapt virðing fyri okkum sum tjóð, og tað hevði eisini styrkt okkara egna sjálvsvirði.

Fleiri felagsskapir og eisini stjórnir í t.d. Europa hava latið pengar til stríðið hjá eitt nú Mandela til frama fyri AIDS-rakt. Hann hevur sjálvur vitjað hesi lond og tikið ímóti pengunum. Hevði tað ikki verið eitt gott hugskot, um almennu Føroyar sum eitt av heimsins minstu men ríkastu samfeløgum tók eitt líknandi stig og síðani beyð Mandela sjálvum at koma eftir hesi menningarhjálpini. Slík vitjan í slíkum ørindum hevði so sanniliga eisini kunnað givið okkum føroyingum nakað afturfyri - at fingið vitjan av tí manni, sum mong hava kjósað sum eitt tað størsta menniskja nakrantíð í søguni, tí hesin m.a. ofraði alt sítt lív í stríðnum móti eini aðrari herviligari sótt, apartheid. Vit ynskja Mandela góða eydnu í hansara stríði móti AIDS.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fiskimaðurin,eitt hátt fólkaslag

**Svenning Borg**
*Vágur*



Formaðurin í Búskaparráðnum er frammi við, at fiskimaðurin skal gjalda fyri at fara til arbeiðis,við tað at fiskidagarnir skulu seljast frá einum almennum fiskidagabanka.

Hettar ljóðar væl í oyrunum á alment løntum, sjálvandi skal fiskimaðurin gjalda, hann fær jú fiskiloyvi fyri onki frá landsstýrinum, so tað má vera tað allarminsta, pengarnir fyri fiskidagarnir kunnu so nýtast til nøkur alment arbeiðspláss afturat.

Veit formaðurin ikki, at fiskiloyvini og fiskidagarnir í dag verða seld saman við skipunum og sostatt ikki kunnu seljast einaferð afturat.

Sami formaður saman við Kristinu Háfoss, Annitu á Fríðriksmørk og Karsten Hansen vilja hava avtikið skattafrádráttin hjá fiskimonnum, hesir fiskimenn sum tjena alt ov nógv frammanundan, manglar bara at siga hjá hesum avriksfólkum.

Sami formaður í Búskaparráðnum fer til arbeiðis uttan at gjalda fyri tað, hvat við at hann skal gjalda fyri arbeiðisdagarnir, sum hann skal hava fyri árið í Búskaparráðnum, teir dagarnir vera nakað dýrir, um ein skal hýggja at eftirlønini hjá honum í forhold til fiskimannin, kanska Búskaparráðið eisini bleiv rikið meira effektivt, um tað bleiv útboðið, og fleiri skilagoðar loysnir blivu funnar, og at umtalan av fiskimanninum hevði meira innihald.

Eisini skal inntøkutrygdin hjá fiskimonnum skerjast sigur landsstýrið, flest øll onnur í samfelagnum hava eina ella aðra inntøkutrygd, men inntøkutrygdin hjá fiskimanninum sker so nógv í eyguni á fullveldislandsstýrinum, at hon helst má avtakast.

Føroyski fiskimaðurin er 6% av fólkatalinum í Føroyum, hesi 6% sum skapa flest virði í samfelagnum á einum arbeiðsplássi sum er frá Norðpol til Suðurpol, og oftani undir ómenniskaligum korum er blivin ein trupulleiki hjá lærda og alment ansetta fólkinum í Føroyum, undrunavert, tí onganstaðni í heiminum eiga 6% av fólkinum so stóran part av landsins fíggjarlóg, sum her í okra heimlandi Føroyum.

Sjálvur eri eg stoltur av at kunna siga, at eg eri ein partur av hesum 6%.

# Hvat krevja tit í Ælaboganum

**Otto Johannesen**
*Keypmannahavn 2003*

Tit í Ælabodanum, hvat er tað, tit krejva av Jenis av Rana? Eitt er tað, at hann skal steðga at kalla tykkum kynvillingar, 2 skal góðtaka homoseksualitet, 3 skal lóggeva eftir tykkara hugsjón.

Eitt annað, sum eg havi hug at spyrja um, er at tá ið nú tit vilja, at vit, sum ikki eru homseksuell, skulu góðtaka tykkara livihátt, hví kunnu tit so ikki góðtaka, at kirkja/bíblian/samkomur ikki kunnu góðtaka homuseksualitet, tað er millum annað tad, sum Jenis meinar við, tað er almenn vitan, at maður og kvinna hoyra samman, at so onnur hava hug til nakað annað, kunnu vit onki gera við, men at krevja at gud skal vælsigna homoseksualitet, sum í donskum kirkjum, og aðrastaðni, er tað sama sum at biðja fanan góðtaka gud, skilji tað, tað letur seg ikki gera.

Spurningin um registrerað ægtaskap og arvarætt kann lata seg gera, sum so nógv annað kann her í heiminum, tað er ein politiskur spurningur, men er tað í trá við kristindómin, sum føroyar standa á, um homoseksualitetur er sjúka, viðføtt, kynsvilla, fananskapur, veit eg ikki, vitinskapurin veit tað heldur ikki, menn rætt er tað ikki, í realitetinum vildi øll verðin doyð út, um øll vóru homoseksuell.

Um tað passar ella ikki, veit eg ikki, men í Jerry Springer Show, var tað einaferð ein kvinna í hevði forelskað seg í einum hesti, hon kravdi, at øll góðtóku hennara kærleika til hestin, hon og hesturin fluttu saman, tey fingu nokk ikki børn/fyl, men tað finnast jú loysnir, mann adopterar bara.

Álvaratos tit í Ælaboganum, takið tykkum saman, fortel okkum, hvat tit veruliga vilja, og krevja.

# Kvinnukvøld og songløta á Vertshúsinum

**TÍÐINDASKRIV**

Í kvøld, fríggjakvøldið, skipar Vertshúsið í Havn fyri Kvinnuvkøldið, sum er fyriskipa av progressivum kvinnum – og einans við monnum sum barrvørðum. ungu sniðgevararnir, Sólvør og Beinta, sýna fram egna kollektiónir, og eisini verður skipað fyri karaokee.

Sunnukvøldið kl 21 fer Havnarkórið undir leiðslu av Ólavi Hátún at syngja jólasálmar, har øll kunnu syngja við.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## UTTAN ÚR HEIMI

# Ísraelsmenn og palestinar taka undir við óalmennu friðaravtaluni




*Undir herrópinum Peace Is Possible (Friður er møguligur) hava ísraelskir og palestinskir embætismenn gjørt eina óalmenna friðaravtalu, men teirra myndugleikarn vilja ikki góðtaka hana*

**Ein meiriluti av ísraelsmonnum og palestinum taka undir við friðaravtaluni, sum ísraelskir og palestinskir embætismenn hava gjørt, men sum myndugleikar teirra ikki vilja góðtaka.**

**FRIÐARAVTALA**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ísraelska stjórnin er í øðini, tí amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, hevur játtað at tosa við menninar, sum hava gjørt ta óalmennu friðaravtaluna, og sum eftir teirra tykki kann loysa kreppuna í Miðeystri. Í Ramallah sigur Yasser Arafat, at avtalan kann ikki brúkast, so hesaferð eru tær báðar leiðslurnar samdar.

Men samstundis vísir ein meiningakanning, at tann vanligi ísraelsmaðurin og tann vanligi palestinin taka undir við avtaluni. Av teimum spurdu ísraelsmonnunum svaraðu 53,3 prosent, at avtalan er í lagi, og tað sama søgdu 55,6 prosent av teimum spurdu palestinunum, skrivar Reuters.

Munurin á teirri óalmennu friðaravtaluni og øðrum uppskotum er, at tann nýggja er munandi meiri nágreinilig enn hinar, og hon tekur støðu til spurningar, sum hini uppskotini ikki taka støðu til.

Millum annað sigur avtalan, at Jerusalem skal býtast í tvey, so býurin verður ísraelskur og palestinskur høvuðsstaður. Markið millum Ísrael og tað palestinska ríkið skal vera markið undan seksdagskrígnum í 1967. Ísrael sleppur at varðveita sínar búsetingar við Jerusalem, og afturfyri skulu palestinar hava eitt tilsvarandi øki í Negevoyðimørkini. Palestinsk flóttafólk sleppa ikki heimaftur til tað, sum nú er Ísrael. Nøkur sleppa tó, og hini skulu hava endurgjald.

# Danskir pengar skulu menna arabiskt demokrati

**Danska stjórnin fer at nýta 100 milliónir krónur til at menna demókratiið og mannarættindini í tí arabiska heiminum.**

**DEMOKRATI**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Donsku pengarnir skulu nýtast til at nútímansgera skúlaverkið, virka fyri frælsum fjølmiðlum, geva kvinnum størri rættindi og bøta um mannarættindini yvirhøvur.

Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, sigur, at ætlanin er ein liður í einum broyttum uttanríkispolitikki. Higartil hevur meginreglan verið, at Danmark skal ikki leggja seg út í viðurskifti í Miðeystri fyri ikki at órógva tryggleikan. Men nú verður politikkurin lagdur um, og endamálið er at fyribyrgja yvirgangi við at samstarva við hóvligar og demokratiskt sinnaðar kreftir í teimum arabisku londunum.

Ætlanin hjá dønum er eisini, at sjálvbodnir danskir felagsskapir skulu arbeiða saman við felagsskapum í teimum arabisku londunum uttan beinleiðis alment eftirlit. Men egyptiski demokrati-serfrøðingurin Hala Mustafa sigur við danska útvarpið, at hetta kann gerast trupult.

– Nýskipanir í tí arabiska heiminum skulu byrja í erva og ikki í neðra, sigur hon.

## Helst eingin oljuleiting

Seinastu tíðina hava norskir fjølmiðlar gjørt nógv burtur úr einari ætlan hjá stjórnini at loyva oljufeløgum at leita eftir olju úti fyri Lofoten. Málið hevur havt stóran áhuga, tí hetta økið er sera góð fiskileið.

Men nú bendir alt á, at stjórnin fer at sleppa ætlanini, sigur norska útvarpið. Sambært útvarpinum er ein av stjórnarflokkunum, Høgri, fyri at loyva oljufeløgunum fram at leiðini við Lofoten, meðan Vinstri og partar av Kristiliga Fólkaflokkinum eru ímóti. Tær norðurnorsku kommunurnar hava biðið stjórnina loyva oljuleitingini fyri at forða tí veksandi arbeiðsloysinum, men sambært útvarpinum fara tær at fáa noktandi svar.

Í Norsk Hydro eru tey vónsvikin av tíðindunum. Eivind Reiten, aðalstjóri, sigur við NRK, at tað hevur avgerandi týdning fyri norsku oljuvinnuna, at feløgini sleppa at bora bæði við Lofoten og í Barentshavinum. Umhvørvisverndarfelagsskapirnir eru hinvegin fegnir um tíðindini.

## Seldu nýru

Løgreglan í Brasil hevur tikið tveir ísraelsmenn og níggju brasilar, sum eru undir illgruna fyri at hava verið í einum altjóða brotsmannaliði, sum hevur rikið ólógligan handil við mannagøgnum.

Sambært løgregluni hevur brotsmannaliðið verið virkið í Suðurafrika og Suðuramerika. Har norðuri í Brasil hava brotsmenninir næstan gingið hús úr húsi fyri at fáa fólk at selja teimum annað nýrað. Umleið 30 menn í hesum økinum játtaðu at lata monnunum annað nýra, og aftur fyri fingu teir millum 40.000 og 65.000 krónur. Menninir, sum játtaðu at selja brotsmonnunum annað nýrað, vórðu sendir til Suðurafrika, har teir síðani vórðu lagdir undir skurð. Tá teir vóru komnir fyri seg aftur, vórðu teir sendir aftur til Brasil.

Teir báðir ísraelsmenninir hava eftir øllum at døma verið oddamenn í brotsmannaliðnum, og teir og teir nýggju brasilarnir kunnu vænta at fáa upp í 15 ára fongsul. Teir 30 menninir, sum lótu brotsmonnunum annað nýrað, kunnu eisini fáa fongsulsrevsing.

## Aftur á mánan

31 ár eftir at amerikanararnir settu menn á mánan á fyrsta sinni, umhugsar USA at royna eina ferð afturat.

National Review skrivar, at George W. Bush, forseti, gongur við ætlanum um at royna at seta fólk á mánan aftur, og at hann helst fer at boða frá ætlanini í einari røðu, sum hann skal halda tann 17. desember. Røðan verður hildin í sambandi við, at 100 ár eru liðin síðani ta fyrstu flogferðina hjá Wright-brøðrunum.

Sambært blaðnum er tað ikki óhugsandi, at forsetin tá fer at kunngera, at USA ætlar at seta eina støð upp á mánanum. Men tað er bert eitt stig í rúmdarætlanunum, tí forsetin fer ivaleyst eisini at nema við tankan at senda eitt mannað rúmdarfar til gongustjørnuna Mars, skrivar National Review.

## Fær grið eftir 24 ár

Síðani 1979 hevur Rolf Clemens Wagner sitið í einum týskum fongsli, tí hann varð funnin sekur í at hava verið við, tá formaðurin í vesturtýska arbeiðsgevarafelagnum, Hans martin Schleyer, varð myrdur í 1977.

Fyri morðið fekk Rolf Clemens Wagner lívlanga fongsulsrevsing, men nú hava myndugleikarnir gjørt av at veita honum grið. Í einari kunngerð frá týska forsetanum, Johannes Rau, verður sagt, at hann sleppur úr fongslinum tann 10. desember.

Rolf Clemens Wagner var í yvirgangsfelagsskapinum Rote Armé Fraktion, sum hevði tætt samband við ein annan felagsskap, Baader-Meinhof. Í 1999 kunngjørdi felagsskapurin, at hann var givin við virksemi sínum. Fýra fyrrverandi limir, tríggir menn og ein kvinna, sita framvegis í fongsli.